# Hevur fortalt evropearum um føroysku fiskidagaskipanina

**Tað var stórur áhuga, tá ið Jørgen Niclasen fyrr í vikuni var í Brüssell og helt fyrilestur fyri ES myndugleikum um føroysku fiskidagaskipanina**

ALTJÓÐA KUNNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er vælkent, at føroyska fiskidagaskipanin hevur vakt miklans ans runt um í heimi. Ikki minst hevur Jørgen Niclasen verið ein ferðandi umboðsmaður fyri føroyingar, tí sum gamal landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevur hann seinastu árini ferðast í nógvum londum, har hann hevur greitt frá føroysku fiskidagaskipanini og teimum fyrimunum hon hevur frammum eina kvotaskipan, sum flest øll onnur lond dúva upp á.

Og í hesi vikuni varð hann so boðin til ES háborgina, Brüssell at halda fyrilestur fyri fiskivinnunevndini hjá ES um fiskidagaskipanina og um úrslitini av henni



*– Hjá teimum politikarum og embætisfólki, sum koma úr fiskivinnuøkjum, hevur føroyska fiskidagaskipanin stóran áhuga, ásannar Jørgin Niclasen*

Men Jørgin Niclasen sigur, at tað var stórur áhugi fyri teimum føroysku royndunum av fiskidagaskipanini eftir at hon nú hevur virkað í 10 ár.

Hetta var ein opin fundur í fiskivinnunevndini og umframt nevndarlimir, vóru eisini einir 50 áhoyrarar og lurtaðu.

– Men tað var eisini skilligt, at áhugin varð størstur hjá teimum, sum komu úr fiskivinnuøkjum, eitt nú úr Bretlandi og Spania.

Hinvegin vóru eisini fólk og lurtaðu úr londum mitt í Evropa, men tey vóru knapt so áhugað. Jørgin Niclasen sigur, at hann samanbar úrslitið av fiskidagaskipanini saman við fiskiskapinum í teimum londum, sum hava kvotaskipanir ístaðin.

– Í stuttum er er úrslitið tað, at í teimum londum, sum hava kvotaskipanir, er fiskiskapurin minkaður niður í helvt hesi seinastu 30 árini.

Hinvegin vísir úrslitið, at í Føroyum er fiskiskapurin tann sami, sum hann altíð hevur verið, tí vit hava altíð fiskað eini 100.000 tons um árið undir Føroyum og tað er framvegis úrslitið undir fiskidagaskipanini.

– Men so skerst heldur ikki burtur, at tað var eitt satt upplivilsi at halda ein fyrilestur, ið varð beinleiðis týddur til øll mál í Evropa, leggur Jørgin Niclasen afturat.

# Kringvarpslógin samtykt

**Stórar broytingar verða fyri Kringvarp Føroya, nú uppskotið um kringvarpslóg varð samtykt í tinginum í dag.**

KRINGVARP
*Rigmor Dam*
*Rigmor@sosialurin.fo*

Framyvir fer tað at bera til hjá kringvarpinum at endurvarpa útlendskar public-service sjónvarpsrásir. Lýsingar verða ongar um eini fimm ár, og kringvarpið kemur helst á fíggjarlógina. Og fólk, sum starvast við tíðindum skulu vera journalistar ella hava líknandi útbúgving. Hetta eru nakrar av teimum størstu broytingunum við nýggju kringvarpslógini, sum løgtingið samtykti, tá uppskotið fekk eina síðiliga 3. viðgerð í dag.

Við nýggju skipanini um Kringvarp Føroya, verða ávísar broytingar í bygnaðinum í mun til áður. Tær báðar mest týðandi broytingarnar verða, í fyrsta lagi, at stovnurin skal hava eitt stýri við sjey limum, sum skal hava evstu ábyrgdina og virka sum skott millum stovnin og politiska myndugleikan. Hin stóra broytingin verður, at public-service uppgávurnar hjá stovninum skulu raðfestast av landsstýrismanninum í samstarvi við leiðsluna og stýrið, eftir aðalorðaskifti í løgtinginum.

Av øðrum broytingum í nýggja uppskotinum um kringvarp kunnu nevnast, at eitt kringvarpsgjald verður fyri hvørt húski, at tað gerst lættari hjá privatum at seta á stovn kringvarp og at kringvarpið skal varðveita alt talgilt tilfar í einum miðlasavni.

Orðaskiftið um kringvarpslógina hevur verið ómetaliga kvast og harðligt, og tingfólk eru ikki sørt skelkað av orðavalinum og fundarsiðinum, sum hevur valdað undir viðgerðini.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

## STUTT SAGT

### Hanus L. Sørensen sýnir fram í Leikalund

**Í kvøld letur upp listaframsýning í Leikalun d við verkum hjá Hanusi Lind Sørensen**

LISTA-FRAMSÝNING

Afturvendandi myndevni í málingunum hjá Hanusi eru føroyska náttúran, skip og bátar. Ein ávís hvíld og lætti hvíla yvir huglagnum og litsamansetingunum, sum ofta geva málningunum eitt inniligt úttrykk.

Hanus er 29 ára gamal, og arbeiðir sum timburmaður hjá Kanjon í Klaksvík. Hann hevur málað síðan 2001, tá hann fór í kvøldskúla hjá listamanninum Archibald Black, har han n síðani hevur verið við í tríggjar vetrar.

Fernisering verður fríggjakvøldið 5. mai kl 19.00, øll eru hjartaliga vælkomin.

Leikalund hevur soleiðis opið:
Mánadag-fríggjadag: 10.00-23.00
Leygardag: 10.00-13.00 og 19.00-23.00
Sunnudag: 19.00-23.00

**ave**

### Den Danske Mafia og Land & Synir á Jóansøku-festivalinum

Vitkunnu í dag avdúka tvey av nøvnunum, ið spæla á Jóansøkufestivalinum. Talan verður um lurtararvinarligan íslendskan popp rokk frá Land og Synum og eina sera annarleiðis útgávu av John Mogensen løgum við Den Danske Mafia.

Den Danske Mafia hevur blást nýtt lív í allar teir stóru John Mogensen slagararnir, sum eisini eru heimskendir í Føroyum. Munurin er bara, at nú verða slagararnir spældir við einum ísletti av góðum tungum rokki, blues og jazz, sum fær ein at hugsað um eina blanding av John Mogensen og ZZ-Top og Thin Lizzy.

Land og Synir eru ein av fólkakærastu íslendsku bólkunum, og hava fyrr vitja í Føroyum við sínum melidiøsa popprokki, tá spældu teir fleiri sera væleydnaðar konsertir kring Føroyar saman við Taxi.